## Barcelona dominerar

Við 473 av 480 møguligum stigum, er Lionel Messi greiðasti vinnarin í søguni hjá Gylta Bóltinum hjá France Football. Honum á baki komu Cristiano Ronaldo (233), Xavi (170), Andres Iniesta (149) og Samuel Eto'o (75). Sostatt spældu fýra av teimum fimm bestu við Barcelona, tá liðið í summar vann Champions League-finaluna móti Manchester United. Og so skuldi verið óneyðugt at nevnt, at tað var Lionel Messi, sum við høvdinum skoraði seinna málið í tí dystinum.



## Írland vil verða nummar 33

Írar vilja framvegis ikki góðtaka, at teir máttu lúta fyri hondini hjá Thierry Henry, tá Frakland vann seg víðari til HM-endaspælið. Nú hevur Írland søkt FIFA um loyvi at gerast land nummar 33 í HM-endaspælinum, sum annars bara telur 32 lond. – Eg leggi sjálvandi málið fyri eksekutiv-nevndini hjá okkum, men ganga vit umbønini hjá Írlandi á møti, mugu vit eisini finna pláss til Costa Rica, sum mátti lúta fyri avgerandi dómaramistaki í sínum play-off dysti móti Uruguay, sigur FIFA-forsetin, Sepp Blatter.

# na talentið



Tað var eingin ivi, tá France Football taldi saman atkvøðurnar um, hvør er besti spælarin í Europa í 2009. Lionel Messi setti met við 473 av 480 møguligum stigum

Mynd: Polfoto/AP

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Lionel Andrés Messi |
| **Føddur:** | 24. juni 1987 í Rosario, Argentina |
| **Hædd:** | 169 cm |
| **Troyggjunr.:** | 10 |

### Spælt sum vaksin

| | |
|---|---|
| **Barcelona:** | 179 dystir/91 mál |
| **Argentina:** | 41 dystir/13 mál |

### Vunnið

| | |
|---|---|
| **La Liga:** | 3 (2004/05, 2005/06, 2008/09) |
| **Copa del Rey:** | 1 (2008/09) |
| **Supercopa de Espana:** | 3 (2005, 2006, 2009) |
| **Champions League:** | 2 (2005/06, 2008/09) |
| **UEFA Super Cup:** | 1 (2009) |
| **U-20 World Cup:** | 1 (2005) |
| **OL-gull:** | 1 (2008) |

### Persónligt

| | |
|---|---|
| **U21 European Footballer of the Year:** | 2007 |
| **Toppskjútti í U20-HM:** | 2005 |
| **Besti spælari í U20-HM:** 2005 | |
| **Copa America, stjørnuskot:** | 2007 |
| **Ársins spælari í Argentina:** | 2005, 2007 |
| **FIFPro Special player of the year:** | 2006/07, 2007/08 |
| **FIFPri Young player of the year:** | 2005/06, 2006/07, 2007/08 |
| **World Soccer young player of the year:** | 2005/06, 2006/07, 2007/08 |
| **Besti útlendingur í La Liga:** | 2006/07, 2008/09 |
| **Besti miðamerikani í La Liga:** | 2006/07, 2008/09 |
| **FIFPro World XI:** | 2006/07, 2007/08 |
| **UEFA ársins lið:** | 2007/08 |
| **FIFA ársins lið:** | 2008 |
| **Champions League toppskjútti:** | 2008/09 |
| **Trofeo Alfredo Di Stéfano:** | 2008/09 |
| **UEFA ársins áleypari:** | 2008/09 |
| **UEFA ársins spælari:** | 2008/09 |
| **LFP ársins spælari:** | 2008/09 |
| **LFP ársins áleypari:** | 2008*09 |
| **Onze d'Or:** | 2009 |
| **Ballon d'Or:** | 2009 |